Átak:

# Fleiri kvinnur upp í politikk

**»Kvinnurnar stýra heimunum – menninir landinum«. Hesin setningur var fleiri ferðir havdur á lofti, tá nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki skipaði fyri evnisdegi á Hotel Hafnia leygardagin.**

KVINNUR OG POLITIKKUR
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Hóast veðrið leikaði í, høvdu nógvar kvinnur og nakrir menn leitað sær til átakið.

Evnini á fundinum vóru politiska valskipanin í dag, alternativir møguleikar til valskipanina og hvat onnur lond hava gjørt fyri at fáa fleiri kvinnur upp í politikk.

Høvuðsfyrilestrahaldari á átakinum var íslendska Hólmfríður Sveinsdóttir, sum er stjórnmálafrøðingur og hevur verið virkin í íslendskum politikki í nógv ár. Somuleiðis sluppu nakrar føroyskar kvinnur fram at mikrofonini.

Fyrst á pallinum var Karin Kjølbro, fyrrverandi løgtingskvinna. Karin greiddi frá, hvussu tað eydnaðist henni at koma á ting, og hvussu umráðandi tað er at vera aktivur og sjónligur í almenna rúminum sum kvinna. Eisini legði Karin dent á, at megnar politiski myndugleikin ikki at hýsa margfeldi og fjølbroytni á tingi við at fáa javnrætt millum bæði kynini, endurnýggja vit ikki framtíðina.

Eftir Karina fekk Bergtóra Hanusardóttir vegna Kvinnufelagssamskipan Føroya orðið. Bergtóra bar Føroyar saman við hini Norðurlondini, samstundis sum hon staðfesti, at vit liggja niðast á listanum, tá tað kemur til javnbýti millum kvinnur og menn á tingi:




*Bergtóra Hanusardóttir vísti við hesari myndini á, hvør leikluturin hjá kvinnum í politikki í Føroyum er í dag og hevur verið seinastu árini.*

– Øll eru betri enn vit, men tað eru ikki vit kvinnur, sum hava feilin. Vit hava eina valskipan, sum heldur helminginum av okkum burtur. Viðvíkjandi fólkaræði riggar skipanin í Føroyum ikki nóg væl. Vit áttu at gjørt Føroyar til eitt, tvey ella trý valdømi, helt Bergtóra Hanusardóttir.

Áðrenn ein lítlan steðg sluppu Ingrid S. Henriksen, fysioterapeutur og bachelor í stjórnmálafrøði, og Bjørg Jacobsen vegna Javnstøðunevndina eisini at siga nøkur orð. Bjørg Jacobsen varpaði ljós á, hví vit mugu fáa fleiri kvinnur upp í politikk, og hvussu tað kann verða gjørt. Og Ingrid S. Henriksen legði eitt uppskot til eina broyting av valskipanini fram, sum hon sjálv hevur gjørt.

Fundurin endaði við einum lítlum kjaki. Ikki vóru nógvir spurningar frammi, men flestu kvinnurnar og menninir tóku undir við sjónarmiðunum, sum vórðu sett fram á røðarapallinum. Somuleiðis tóktust øll at vera glað um tiltakið og róstu stigtakarunum.

## FAKTA

Nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki ætlar at skipa fyri einari røð av tiltøkum, og tiltakið leygardagin var tað fyrsta av sínum slag.

Nevndin er sett saman av umboðum fyri allar politisku flokkarnar, Kvinnufelagssamskipan Føroya, Kommunusamskipan Føroya, Føroya Kommunufelag og Javnstøðunevndini.



*Livandi tónleikur og drekkamuður hugnaðu um evnisdagin.*



*Hóast veðrið leikaði í, høvdu nógvar kvinnur og nakrir menn leitað sær til átakið*

# – Nú

**Heldur Ingrid S. Henriksen – fysioterapeutur og bachelor í stjórnmálafrøði – sum hevur gjørt eitt uppskot til eina broyting av løgtingsvallógini, sum hevur til endamáls at tryggja eitt javnari býti av tingsessum millum menn og kvinnur**

KVINNUR OG POLITIKKUR
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

– Løgtingið prátar og prátar um javnrætt, men um vit kvinnur ikki traðka til nú, fer tað at taka alt ov nógv ár, áðrenn nakað sum helst hendir. Hvussu leingi skulu vit finna okkum í, at so fáar kvinnur eru á tingi?- spyr Ingrid S. Henriksen, sum heldur tað vera rímiligt at

Hólmfríður Sveinsdóttir:

# – Politisk

**- Fólkaræði verður ikki, fyrr enn menn og kvinnur arbeiða á jøvnum støði í samfelagnum og ríka um hvønn annan við vitanini, sum skilur kynini. Boðskapurin hjá Hólmfríður Sveinsdóttir, sum hevur verið virkin í íslendskum politikki í fleiri ár, var greiður á evnisdegnum.**

KVINNUR OG POLITIKKUR
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

- Avgerðir, sum kvinnur og menn taka, eru ofta sera ymiskar. Helvtin av tjóðini eru kvinnur, og tískil er tað bert rættvíst, at fleiri kvinnur bjóða seg fram í politikki, legði Hólmfríður Sveinsdóttir dent á á evnisdegnum á Hotel Hafnia leygardagin.

Hólmfríður greiddi á fundinum frá, hvat Ísland hevur gjørt fyri at fáa fleiri kvinnur upp í politikk.

Hon ásannar, at íslendsku kvinnurnar leingi hava stríðst fyri støðu síni í politikki, men at arbeiðið hevur borið ávøkstur: